# Fylgiskjal

# Áheitanir og úttalilsir

Sum fylgiskjal til áheitanarskrivið, sum varð samtykt á aðalfundi hjá Giktafelag Føroya, eru hjáløgd úttalilsir, áheitanir og afturmeldingar fyri giktaøki, sum alt nertir við ella viðgerð partar av tí, sum annars stendur í áheitanarskrivinum.

Í summum førum er talan um facebookdagføringar, sum avsendararnir hava ynskt at leggja afturat hesum skrivi, og skal hetta tí síggjast sum ein afturmelding til verandi støðu.

## Innihaldsyvirlit


**Anna Petersen -** Teir mest settu spurningarnir á giktatelefonini ........ 3

**Ann-Mari Jacobsen** – Ónøgdsemi um konsulentskipanina ........ 4

**Dávur Glerfoss** – Sjúkrasøga og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring ...... 5

**Elna Joensen** – Áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv ........ 9

**Eydna Poulsen** – Stúran um konsulentar og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv. ........ 10

**Gladys Olsen** – Úttalilsi frá avvarðandi um íkomna støðu, við ongari klimaviðgerð og ongum Pero Soré, Facebookdagføring ........ 11

**Jákup Mørk** – Ávaring um ætlaða konsulentskipan og stuðulsskriv/áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring ........ 13

**Julianna Rasmussen** – Úttalilsi um sjúkrastøðu og hvat tað ger við familjulívið, og ynski um klimaviðgerð, Facebookdagføring ........ 16

**Kirsten Elisabeth Hartmansdóttir** – Frágreiðing um sjúkugongd, væntandi viðgerð og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv ........ 18

**Mariann S. Poulsen** – Ónøgdsemi um eina giktadeild, sum “er í sorli”, og um raðfestingar av konsulentum, framum giktalækna Pero Soré ........ 21

**Mary Kirstenardóttir Cazabon** – Frágreiðing sum avvarðandi, um mammuna, sum er illa stilla orsaka av gikt, og um hvussu farið verður fram, fyri at fáa viðgerð.......22

**Nora Maria Gærdbo** – Frágreiðing um sjúkustøðu.......25

**Óli S. Poulsen** – Søga hjá avvarðandi og úttalilsi um eitt giktaøki, sum stendur í hóttafalli, Facebookdagføring.......26

**Rógvi Beder –** Átala handfaring av diagnostisering, sum varð sett í dag.......27

**Rósa Gaardlykke Egholm** – Afturmelding um konsulentskipanina.......29

**Terji Beder** – Áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv.......31

**Tove Askham** – Afturmelding og lýsing av ræðandi uppliving við konsulentskipanini og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv.......33

**Tove Ellingsgaard** – Úttalilsi um sjúkrastøðu og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring.......34

**Vanja K. Joensen** – Afturmelding um konsulentskipanina og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv.......36

# **Anna Petersen** - Teir mest settu spurningarnir á giktatelefonini

Afturvendandi spurningar settir til Giktatelefonina 20 tey seinastu árini

- Hvat skal eg gera fyri at sleppa til giktalækna – hvussu beri eg meg at?
- Hvussu leingi skal eg bíða fyri at sleppa framat giktalækna?
- Hví skal eg bíða tvey ár fyri at sleppa framat?
- Hvussu ber tað til, at eg skal bíða so leingi?
- Grátandi fólk við nógvari pínu sum spyrja, hvat er at gera fyri at fáa giktalækna í talu?
- Hví er ongin giktalækni á LS?
- Hví skulu vit noyðast við konsulentar?
- Hví skulu tað vera skiftandi konsulentar?
- Hví kann tað ikki vera tann sami konsulenturin vit koma til?
- Hvussu kunnu vit lata okkum upp fyri konsulentum, vit kenna teir ikki og teir ikki okkum?
- Hví sigur kommunulæknin, at eg ikki havi tørv fyri at fara til giktalækna?
- Kann eg fáa biologiskan heilivág?
- Hví fái eg bara pínuheilivág?
- Hvussu sleppur man til klimaterapi?
- Hvat ger man á klimaterapi?
- Hvat kostar tað at fara á klimaterapi?
- Hví sleppur A til viðgerð í Kroatia og ikki B?
- Hví ger Giktagelagið ikki meira fyri, at vit kunnu hava fastan giktalækna?
- Hvat fái eg burturúr at verða limur í Giktafelagnum?
- Hví er Pero ikki longur lækni á LS?
- Hví fær Pero ikki frið til at verða verandi á LS?
- Nær verður Pero aftur á LS?
- Hvussu fái eg hjálpt til fyri at fáa Pero aftur í starv á LS?
- Hvat kann eg gera/hjálpa til við at fáa Pero aftur í starv á LS?
- Er tað nakað, eg kann gera, fyri at fáa Pero aftur í starv?

Anna Petersen

## **Ann-Mari Jacobsen** – Ónøgdsemi um konsulentskipanina

Hey Hey!

Eri so inn í sálina troytt av, at møta til viðtalur við donskum konsulentum. Ongantíð tann sami læknin og av tí sama er viðgerðin eisini skiftandi. Ein sigur eitt og hin sigur eitt annað.

Vh Ann-Mari Jacobsen

**Dávur Glerfoss** – Sjúkrasøga og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring

## Fyrst klimaviðgerðin, so giktalæknin, hvat verður tað næsta?

Eg fekk staðfest Morbus Bechterew tíðliga í 2000 og Morbus Crohn nakað seinri.

Havi roynt rættiliga nógvan heilivág, bæði fyri pínu, møði og bruna, gjøgnum ár og dag. Men satt at siga hevur einki av hesum hjálpt serliga væl, fyri uttan tann fyrsta lívrunna heilivágin, ið eg fekk bjóða í 2002. Eg var so heppin at vera ein av teimum fyrstu at royna hendan heilivágin í Føroyum. Hesin heilivágur er tann einasti, ið hevur riggað væl til mín. Pínan, stívheitin og serliga nógva møðin hvarv so at siga í einum.

Eg hevði gagn av hesum heilivági í nøkur ár, inntil virknaðurin tíverri bleiv avtakandi, og sjúkuaktiviteturin byrjaði aftur við stívheit, nógvari pínu og møði, og til tíðir við rættiligari nógv verri stívheit, pínu og møði enn vanligt. Hetta hevði við sær, at eg ikki longur megnaði at røkja mítt arbeiði sum pedagogur. Eg var nógv burtur frá arbeiði vegna sjúku og var sjúkrameldaður í tíðarbilum. Hetta førdi við sær, at av tí at eg hevði so nógvar sjúkradagar, fekk eg bjóða vart starv við tí vón um, at um eg nú arbeiddi minni, fór tað at ganga betri framyvir. Eg royndi eitt tíðarskeið í vardum starvi, hetta var áðrenn støðan bleiv enn verri. Heilsustøðan batnaði ikki og eg endaði við at fara í sjúkrafarloyvi. Eftir sjúkrafarloyvið var einki arbeiði til mín. Eg mátti søkja eins og øll onnur, og tað var ikki lætt, tí eg hevði eitt brek, ið gjørdi, at eingin vildi seta meg í starv. Til síðst var einasti og seinasti møguleiki fyritíðarpensjón, sum eg fekk játtað í 2007.

Mín sjúkrasøga byrjaði, tá ið eg var umleið 14 ára gamal. Eg hevði nógva pínu, sum kom og fór, í rygginum. Pínutíðarskeiðini blivu longri og longri, sum árini gingu, til tey til síðst hingu saman, og pínan varð konstant. Pínan var ymsastaðni í rygginum, onkuntíð millum herðabløðini, niðarlaga í lendunum, strálaði niður í beinini/fótin og í muskilfestir runt í øllum rygginum. Til tíðir hevði eg ilt allastaðni í senn.

Flutti heim úr Danmark eftir lokna útbúgving sum pedagogur í 2000. Eg arbeiddi sum pedagogur í nøkur ár á dagstovni og á serstovni. Tað var um hetta mundið, at tað var mest aktivitetur í sjúkuni. Varð innlagdur 2001 til kanningar, tí aktivteturin og pínan var so ógvuslig. Har fekk eg staðfest, gjøgnum giktalæknan, at talan var um Morbus Bechterew (gikt í rygginum). Eg fekk staðfest Morbus Crohn (kroniskur bruni í tarminum) stutta tíð eftir hetta. Á medisinsku deild, har eg lá innlagdur, fekk eg ein bókling blakaðan í høvdið og fekk at vita, at eg skuldi fara heim og taka tablettirnar, eg hevði fingið.

Her byrjaði ein sonn marra.

Komin heim fór eg at lesa hendan bókling. Og hugsaði til um tað ringasta, ið kundi henda mær, nú eg hevði fingið staðfest hesa sjúkuna. Tað vóru nógvir tankar, ið fóru gjøgnum høvdið - hvat við arbeiði, við familjuni, við børnunum, frítíðaraktivitetinum, og hvat um eg bleiv so kropin og stívur,

at eg ikki kundi fungera í einum gerandisdegi? Og at vita, at eingin hjálp var fyri at steðga hesum ræðuligu sjúkum - tá hevði eg stóran tørv á at kunna tosað við ein sálarfrøðing fyri at fáa hesar tankar og hugsanir uppá pláss.

Men hetta var ikki eitt tilboð, eg varð bjóðaður.

Eftir nógv stríð fekk eg, ár seinni, hesa hjálp, og tað var gott at fáa nøkur ting uppá pláss. Tað var eitt tað fyrsta tilboði, ein skuldi fingið, tá ein fær slíkar boð/diagnosur.

Eg havi verið innlagdur á giktadeildini á ríkissjúkrahúsinum, har var eg í 2 mánaðar. Tey gjørdu nógvar kanningar, skanningar og royndir. Har royndi eg eisini lívrunnan heilivág, tó uttan úrslit. Og sum eina seinastu roynd seinnri á pínusentrinum á ríkissjúkrahúsinum, har eg royndi nógv ymisk sløg av serligum pínuheilivági. Okkurt av tí riggaði nøkunlunda, men ikki heilt gott, tað tók tað ringasta av broddinum. Ein vandi var, at eg kundi blíva bundin av heilivágnum. Hesa tíðina var eg noyddur at ferðast niður til Danmarkar 4. hvørja viku, fyrst at fáa lívrunna heilivágin og seinri til samrøður og kontroll á pínusentrinum.

Í 2019 var eg aftur á pínusentri, hesaferð á sjúkrahúsinum á Tvøroyri. Har var eg til viðtalu hjá sálarfrøðingi, sosialráðgeva og hjá pínulækna. Viðgerðin varð sett saman av viðtalum og venjingum, sum vóru í heitum hyli, umframt einum viðgerðarhátti í kroppsterapi. Pínusentrið er eitt sera gott tilboð. Tað er tó ikki lætt at búgva á Argjum og noyðast ferðast til Suðuroy fleiri ferðir um vikuna. Hetta gevur nógva ferðing og nógva tíð, har tú bíðar eftir Smyrli. Og tað kann vera hart fyri kroppin at sita á einum stóli stóran part av degnum, tí ein ongastaðni hevur at fara í bíðitíðini.

Um viðgerðin varð skipað sum ein longri og samanhangandi viðgerð, ivist eg ikki í, at allir partar høvdu fingið størri úrskurð, bæði so og so. Hendan viðgerð kundi bjóða venjingar og samrøður, umframt betri møguleika fyri uppihaldi, og at tað ikki gongur ov long tíð millum viðgerðartíðarskeiðini, t.d. við venjing og samrøðum, eitt nú 2 vikur í eitt tíðarskeið, og so 3 vikur eina aðru ferð - alt eftir tørvi. Sum er nú, er møguligt at vera eina viku við viðgerð, og av og á við langari tíð ímillum hvørja ferð.

Havi roynt fleiri onnur sløg av lívrunnum heilivági yvir fleiri ár, onki kom at rigga aftur nær námind av tí fyrsta, eg royndi. Havi roynt fleiri ymisk sløg av pínuheilivági og lívrunnan heilivág, men uttan virkna. Sjúkueyðkenni eru tíðarskeið við rættiliga nógv meir pínu, stívheit og møðin, sum nokk er tað, ið er ringast.

Var hjá Pero Sore, giktalækna, í 2013, har eg fekk bjóða klimaviðgerð á fyrsta sinni. Viðgerðin er boðin fram í Kroatia í heitum klima og við intensivari venjing 3 ferðir um dagin, bæði á turrum og í heitum hyli, umframt ymiskar aðrar viðgerðir so sum súgvukoppar við og uttan streymi, magnetterapi, streymviðgerð (Tens), ultraljóð, lasari, handamýking, hitaviðgerð og oljubað í heitari Naftalan-olju (36-38 hitastig). Hendan viðgerðin hevur hjálpt mær sera væl, eg havi fingið meira rørslur, meira orku og minni stívheit og pínu. Tað hevur gjørt, at tey ringu tíðarskeiðini ikki hava verið líka ring, og hetta hevði við sær, at eg havi kunnað virkað so gott, sum eg nú einaferð kann - ja, stutt sagt fingið meira og betri lívsgóðsku. Tað, at hava mist hesa einastu viðgerð, ið kann hjálpa

mær, eri eg sera harmur og ótrúliga keddur av. Ikki minst tí, at eg ikki kann fáa hesa hjálp, ið ger, at eg kann virka og hava tað betri - eisini sæð í ljósinum av at vita, at tey ringu tíðarskeiðini verða rættiliga nógv verri og harðari at koma ígjøgnum. Og tað síggi eg ikki fram til, alt annað, eri satt at siga rættiliga stúrin fyri, hvussu tað verður. Mítt inniliga ynski og vón er, at klimaviðgerðin kemur í rættlag aftur sum skjótast - soleiðis at møguleiki verður at fara aftur, hetta longu í heyst.

Tað er sera stórur munur á at venja í heitum klima og her í Føroyum. Rørslurnar blíva longri og størri, tað er lættari og við minni pínu, virkningurin varar longri, upp til 1 ár og enntá longri, mótvegis 2-3 mánaðum, um viðgerðin var í Føroyum.

Heilsuverkið og almannaverkið hava endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, og tað er sjálvandi gleðiligt og gott, at tað tilboðið er endurskoðað. Hetta tilboðið er kortini als ikki tað sama, men fungerar gott sum samviðgerð. Í teimum ringu tíðarskeiðunum eri eg sum oftast seingjarliggjandi og/ella rættiliga illa gongdur, følist, sum at ganga á brotnum beinum. Og til tíðir, tá ið støðan er ringast, fái eg ikki gingið, tí iskiasnervarnir koma í klemmu grunda á, at sjúkuaktiviteturin verður hægri, og musklarnir niðarliga í rygginum knýta seg, teir læsast. Tá eri eg noyddur at rulla út úr seingini á gólv, síðani brúka armarnar at aka við fyri at koma runt á wc ella í køkin, og hvar eg enn skal, og so inn aftur til seingina. So tað er ikki altíð so lætt ella einfalt, fyri ikki at siga ómøguligt. Síðani eg havi fingið klimaviðgerð, eru sum sagt tey ringu tíðarskeiðini ikki líka ring og ikki líka long. Tí er tað altavgerandi lívsneyðugt, at eg fái hesa viðgerð, tí eg havi onga aðra viðgerð, ið kann hjálpa mær.

Fyri at gera ilt verri, so er Pero Sore, giktalækni, ikki í starvi longur, og tað ger, at støðan hjá okkum giktasjúklingum er blivin munandi skerd við tí, at vit ikki kunnu koma til giktalækna, tá í tørvur er á tí, til eitt nú jøvn kontroll og serliga, um okkurt akutt er. Hetta ber ikki til, tí tað er bara ein giktalækni á LS.

LS velur at brúka giktalækna-ráðgevar úr Danmark, sum koma í staðin fyri fastan lækna á staðnum. Hesir ráðgevar eru her í tíðarbilum, vanliga 1 viku í senn, t.d. 2.-3. hvønn mánaða. Sum nú er, eru vit aftur har, sum vit vóru fyri rættiliga nógvum árum síðani. Hetta er bara als ikki ein gongd leið. Hendan skipanin, haldi eg, riggaði sera illa, bæði at tað skuldi tosast danskt, tí tað kann gerast sera torført at tosa annað mál, hetta tí tað var ringt at finna tey orð og vendingar, ið best lýstu støðuna, og at tað aloftast var ein nýggjur giktalækni hvørja ferð.

Sjálvur minnist eg bara ilt aftur á ráðgevaratíðina. Hvørja ferð, eg kom til giktalækna, var tað sum oftast ein nýggjur lækni. Fyrsti trupuleikin var, at journalin var á føroyskum, og giktalæknin var dani og skilti ikki føroyskt. So skrivarin varð noyddur at umseta. So varð eg spurdur: Nær byrjaði hetta? Hvørja viðgerð hevur tú fingið? Hvønn heilivág tekur tú? Og hvønn heilivág hevur tú tikið? Nær og hvussu leingi? osfr. osfr. Hetta er ikki altíð so lætt hjá mær at vita. Tað er heldur ikki so lætt at minnast alt hetta. Ein stórur partur av at hava kroniska pínu ger, at pína brúkar á leið 70% av konsentratiónsførinum og orkuni, og tí ger tað truplari at minnast, og at virka.

Viðtalurnar eru á leið 20-25 min. Og tað er ikki nógv tíð, tá ið tað skal umsetast og lesast uppá, meðan eg/sjúklingur var inni hjá læknanum. Hetta gjørdi, at tíðin til at taka avgerð um, hvør viðgerðin skuldi verða framyvir, var ikki altíð so long ella onkuntíð nærum eingin. Tað hvørki var og er ikki lætt at viðgera ein truplan sjúkling sum meg, tí einki hevur hjálpt, sum er. Morbus Crohn er ikki lætt at viðgera hjá mær, tí har er samanhangur við aktivitetin í rygginum og aktivitetin í búkinum.

Har hevur altíð verið fastir læknar á LS, og tað eri eg sera glaður fyri. Havi roynt nógvan ymiskan heilivág og ikki fyrr enn nú í 2022 er vónandi friður komin í tarmanar. Og vónandi varar tað við

Tí er tað av størsta týdningi, at vit fáa Pero aftur í starv sum skjótast, so vit kunnu koma til ein lækna, ið kennir okkum og skilur okkum, og ikki minst fáa alt aftur í eina fasta legu, soleiðis at vit ikki føla okkum slept uppá fjall - tí tað gera vit, sum nú er. Pero kennir so at siga allar sjúklingar í Føroyum, sum hava gikt og hevur eina holla vitan og royndir um viðurskifti, sum eru her í Føroyum. Og ikki minst, hann skilur og tosar føroyskt.

Eg vil leggja aftrat, at eg í mínari sjúkragongd ikki visti, at tað vóru limafeløg, ið arbeiddu við at upplýsa og kunna um gikt og Morbus Becterew, hetta eru Giktafelagið og MB felagið. Tað var og er ein stór hjálp at kunna møtast og tosa við onnur, ið høvdu og hava somu avbjóðingar og eru í somu ella líknandi støðu. Kunning og upplýsing er á allan hátt góð hjálp.

Facebookdagføring dagførd 2. september 2022

## **Elna Joensen** – Áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv

Vónandi verður giktalæknin Pero Sore settur í starv aftur.

Vit eru fleiri,sum hava fingið sera góða hjálp frá honum.

Vh

Elna Joensen
Sjúkrarøktarfrøðingur

**Eydna Poulsen** – Stúran um konsulentar og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv.

Fyri fyrstu ferð, síðan giktin breyt út hjá mær í 2014, havi eg verið til viðtalu hjá øðrum lækna enn Pero Sore. Má siga, at eg føldi meg ikki sørt ótrygga at fáa boð um, at tað var ein danskur konsulentur, ið eg skuldi til. Alt gekk tó væl. Eg fái innkalling aftur um eitt hálvt ár, men so kemur spurningurin:

Hvør verður tá ?

Eg vóni so innarliga at vit fáa okkara dugnaliga lækna Pero Sore aftur, so vit aftur føla okkum í tryggum hondum.  Og at vit aftur sleppa til klimaviðgerð á Naftalan, ið hevur verið mær og øðrum til so stórt gagn.

Ps. Havi nýliga verið 10 dagar í Dk. Fór avstað við nógvari pínu í vinstru mjødn og mátti tískil ganga við høkju. Komin heimaftur er pínan so at siga vekk. So kann ein og hvør ímynda sær, hvussu gott tað er fyri giktapatientar at sleppa til klimaviđgerđ í Kroatien í 4 vikur.

Eydna Poulsen

**Gladys Olsen** – Úttalilsi frá avvarðandi um íkomna støðu, við ongari klimaviðgerð og ongum Pero Soré, Facebookdagføring

## Hvat nú?

Maðurin hevur gikt. Í øll 46 árini eg havi kent hann, hevur hann drigist við giktasjúku. Fyrsta árið, ið var í 76-77, var hann ikki førur fyri at arbeiða. Støðan batnaði so líðandi, og kom hann so aftur til arbeiðis. Giktalæknin tá, Elin Mørkøre, gjørdi hvat hon kundi gera. Tað var eingin heilivágur fyri gikt uttan pínustillandi heilivágur. Og tá fanst eiheldur nøkur greining.

17 heil ár seinni fekk hann loksins eina diagnosu. Men framvegis munaði eingin heilivágur.

Likamliga støðan hjá honum var upp og niður, góðir og minni góðir dagar, og soleiðis var fram til 2006.

Vit vóru til ein fyrilestur í Fuglafirði har ein maður, ið kallast Pero, greiddi frá ymiskum viðvíkjandi giktasjúkum. Tá fingu vit eina vón um, at onkur glotti møguliga var fyri framman.

Maðurin kom síðani í viðgerð hjá hesum omanfyrinevnda Pero. Tá bleiv ein viðgerðarætlan gjørd, sum stevndi móti einari biologiskari viðgerð, um einki annað hjálpti.

Áleið í 2010 byrjaði hann við heliváginum “humira”. Tað var sum at hann varð føddur av nýggjum. Endiliga! Eingin pína. Eingin neyð. Tað var næstan ov gott til at vera satt. Og so var. Tann góða tíðin gjørdist stokkut. Hjáárinini vístu seg. Møguliga av heilivágum og møguliga av einum arbeiðsumhvørvi í soppi. Alt annað líka, viðgerðin kundi ikki halda fram, tí lungu og hjarta vóru undir herviligum trýsti.

Eftir eina góða viðgerð hjá Pero og hjarta- og lungalæknum í DK, varð avgerð tikin um, at maðurin skuldi gevast í sínum lívsstarvi.

Hetta kundi lata seg gera, tí hann kundi fara frá sum 60 ára gamal.

Í august 2013 var Pacemakeri ísettur í DK. Maðurin var saman við 4999 øðrum fólkum í ymsum londum, við einari stórari kanning

Kanningin kravdi regluligar kanningar og eitt skema varð gjørt nær hesar kanningar skuldu gerast. Eg sá møguleikan. Fekk mær farloyvi frá mínum arbeiði, og leiðin gekk til Spania í góðar 11 mánaðir.

Hann fekk góða vegleiðing úr Danmark í samband við eftirlitini hjá sær, og góða veðrið í Spaniu hevði heilsubót við sær.

Komin aftur til Føroyar, foraldi hann fyri Pero,  hvussu gott tað góða veðrið hevði verið fyri likamið.

Tað hevði við sær, at hann slapp til Croatia til klimaterapi í 2016. Tann tíðin á Naftalan og Biograd hevði við sær, at hann í 10 mánaðir aftaná viðgerðina, hevði tað munandi betur.

Hann fór aftur í 2019 og í 2021 við somu úrslitum.

Nú er eingin klimaterapi!

Nú er eingin Pero!

Hvat nú?

Við avgerðini hjá landssjúkrahúsinum, síggja vit avvarandi ikki við ljósi inn í framtíðina.

Tí, hvat hevur framtíðin nú at bjóða okkum?

Gladys Olsen

Facebookdagføring dagfest 4. september 2022

**Jákup Mørk** – Ávaring um ætlaða konsulentskipan og stuðulsskriv/áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring

## Giktaøkið fer í sor

Tað verður rópað varskóð frá nógvum, men enn tykist eingin í Heilsumálaráðnum at latast um vón.

Annar av føroysku giktalæknunum er í løtuni ikki í starvi, og fær HMR sín vilja, koma vit aftur í eina skipan við útlendskum konsulentum, sum fyribils koma at røkja part av føroysku giktasjúklingunum. Fyribils, tí tað er eingin ivi um, at hetta kemur at viðføra eitt munandi størri trýst á einsamalla giktalæknan, sum nú er eftir.

Sjálvur fekk eg staðfest gikt sum 24 ára gamal. Tá hevði eg í eini tvey ár stríðst við nógvar sjúkrameldingar og hópatals kanningar, men ikki fyrr enn knæ- og fótliðir brádliga hovnaðu ógvusliga, komu læknarnir eftir, hvat var galið. Tá vóru bara konsulentar at røkja giktaviðtaluna, og harvið gjørdist bíðitíðin eisini drúgv. Heldur ikki var gjørligt at hava nógv stutt ímillum viðtalurnar, og tí var einasti útvegurin ein heilivágur, sum eg illa toldi, og fleiri ferðir mátti gevast við, fyri síðani at royna aftur. Enntá fekk eg eina tíð góð ráð um at taka annað slag av giktaheilivági, sum slettis ikki hjálpti móti júst mínum bregði av sjúkuni.

Fyri ca 12 árum síðani stóð somikið illa til, at eg bað um at verða innlagdur. Øll vinstra síða var púrasta stív, og pínan – serliga fyrstu tímarnar um morgunin, var ræðulig.

Kommunulæknin vildi tó ikki hoyra talan um innlegging, so ístaðin fekk eg ibubrufen og panodil eitt tíðarskeið, inntil eg aftur kom til kommunulækna. Av tilvild hevði kommunulæknin um hetta mundi hjálp frá einum dani, ið kendi Pero Sore, sum nú var í starvi sum giktalækni. Hann ringdi beinleiðis til Pero, sum alt fyri eitt fekk pláss fyri mær í kalendaranum, og tað gjørdist ein game-changer hjá mær.

Nyttuleysi heilivágurin móti slitgikt – sum eg ikki hevði – varð skrottaður, og ístaðin fekk eg útskrivað nýggjan heilivág, sum veruliga hjálpti. Hjáárin vóru framvegis, men livimátin gjørdist so ræðuliga nógv betri, og so má mann vælsaktans liva við onkrum ónollum.

Var talan um konsulent-skipanina, hevði eg helst verið noyddur at blivið innlagdur, ella sum alternativ at ganga eini tvey ár við ógvusligari pínu. Somikið ógvusligari, at eg neyvan hevði kunnað arbeitt. Bíðitíðin at koma til giktalækna á LS var um hetta mundið tvey ár, men við at hava privata praksis kundi Pero minkað munandi um hendan bíðilistan.

Privat praksis ljóðar dýrt og ekslusivt, og tað tykist, sum hava skiftandi landsstýrisfólk havt ilt við at skilja, hvat talan í veruleikanum er um. Veruleikin er nemliga, at hetta er nógv tann

kostnaðareffektivasti hátturin at kompensera fyri læknatroti. Í ítøkiliga førinum merkti tað, at giktalæknin hevði sítt egna lítla ambulatorium heima við hús, har hann arbeiddi fyri danskar dagtakstir. Altso ein skipan, har læknin í veruleikanum arbeiddi yvir hvør einasta kvøld, men fyri kostnaðin av dagtímum.

Fyri giktasjúklingar hevði hetta eisini tann fyrimun, at hvør tann einasti yvirtími varð brúktur til giktasjúklingar. Umframt at vera giktalækni er Pero Sore eisini intern-medisinari, og tí hevur partur av gerandisdegi hansara eisini fevnt um stovugongd á medisinskari seingjardeild.

Skipanin við privatari praksis stóð tó ikki við, tá eingin prístalsregulering varð framd, soleiðis sum undirskrivaði sáttmálin annars staðfesti. Fleiri ferðir varð lyfti givið um, at hetta skuldi mann hyggja at, og HMR segði seg vilja arbeiða fyri nýggjum sáttmála við serlæknafelagið, so hetta skuldi koma í rættlag. Men mær vitandi eru bara einstakir mailar sendir aftur og fram í eini 5 ár, og tað kann ikki tulkast øðrvísi, enn at eingin vilji er at gera sáttmála innan hetta serøkið.

Ístaðin royndi mann at kyrra fólk við seta ein óbrúkiligan lækna í starv. Giktafelagið fekk frænir av, hvør hesin læknin var, men hóast staðiligar ávaringar frá giktavelagnum valdi HMR at seta hendan læknan í starv, og hann vísti seg eisini sum óbrúkiligan. Tað gekk heldur ikki leingi, áðrenn læknin stakk í sekkin, og síðani hevur eingin sæð nakað sum helst til hann.

Seinni er annar føroyskur giktalækni komin í starv, og tað hevur avgjørt verið eitt risa-framstig. Tað skerst tó ikki burtur, at tørvurin á privatari praksis framvegis hevur verið til staðar, tí bíðilistin við tveimum giktalæknum hevur verið munandi longri, enn hann var við einum giktalækna, sum eisini hevði privata praksis.

Fyri meg persónliga gjørdist sjúkustøðan heilt góð fyri á leið trimum árum síðani. Tá spurdi Pero meg, um eg hevði hug at royna slóðbrótandi CST-viðgerðina, sum nakrir starvsfelagar hansara høvdu roynt við góðum úrsliti. Her er talan um at útvinna serum úr blóðinum hjá sjúklinginum, og er talan um framkomnan hátt at basa fleiri sløg av giktasjúkum.

Í dag merki eg millum lítið og einki til giktasjúkuna í gerandisdegnum. Heilivágurin er einvíst úr mínum egna blóði, og tí eru eingi hjáárin yvirhøvur, og eitt nú kann nú eg nú venja rímiliga harða venjing, uttan at hetta skalar meg yvirhøvur.

At hetta letur seg gera kann eg takka einum framfýsnum lækna fyri. Einum lækna, sum seinastu fjúrtan árini hevur stríðst fyri sínum serøki og fyri føroyskum giktasjúklingum, og tað eru vit fleiri túsund, sum eru takksom fyri.

Og tí eru vit eisini fleiri túsund, sum standa púrasta spyrjandi, nú ein eftir øllum at døma persónlig illstøða ber við sær, at læknin ikki sleppur til arbeiðis.

Og at enda – aftur til konsulentarnar. Um heilsumálaráðharrin og sjúkrahússtjórin sjálvir trúgva tí, tá teir siga, at giktaviðgerðin í Føroyum verður á sama støði, nú útlendskir konsulentar skulu vera við til at lyfta uppgávuna, so taka teir so dyggiliga feil.

Ein konsulentur er bara part av tíðini í Føroyum, og tí verður arbeiðstíðin sum giktalækni minni, enn hon er við føstum giktalækna.

Ein konsulentur kennir ikki á sama hátt sjúklingasøguna hjá sjúklinginum, og tí verður hvør einstøk viðtala drúgvari.

Hagtølini fyri viðtalur á giktaambulatorium taka ikki hædd fyri teimum viðtalum, sum eru á medcare, sum er klinikkin hjá Pero. Her fæst hann tó í dag nógv við eitt nú ítróttaskaðar, og tí er talið av giktasjúklingum langt ífrá tað sama, sum tað var, tá hann hevði avtalu við Heilsutrygd.

Talan er um konsulent, sum seinastu nógvu árini hevur starvast innan privata heilsusektorin í Danmark. So at siga allir kompleksir sjúklingar – teirra millum tey, ið nýta biologiskan heilivág – eru knýttir at danska sjúkrahúsverkinum. Konsulenturin hevur tí null (0) royndir við biologiskum heilivági.

Konsulent-tímar eru so øgiliga nógv dýrari enn vanligir arbeiðstímar hjá einum lækna eru. Úrslitið verður, at føroyska giktaøkið verður munandi dýrari. Tá góðskan eisini verður verri, verður talan uttan iva eisini um nógv størri samfelagsútreiðslur við fleiri sjúkrameldingum, skerdum arbeiðsførleika og beinleiðis invalideringum. Við øðrum orðum, so verður støðan við hetta lag skjótt tann sama, sum hon var fyri 15 árum síðani.

Eg nokti at trúgva, at tað er hetta, sum heilsumálaráðharrin og sjúkrahúsleiðan ynskja. Vónandi ber framvegis til at snara málið aftur á beint, so vit aftur hava tveir fulltíðarsettar giktalæknar í føroyska heilsuverkinum. Heldur í dag enn í morgin!

Facebook dagføringin er dagførd 6. september 2022

**Julianna Rasmussen** – Úttalilsi um sjúkrastøðu og hvat tað ger við familjulívið, og ynski um klimaviðgerð, Facebookdagføring

40 ár og ferdig.

Soleiðis følist tað, tá heilivágurin ikki riggar.

Man sær ikki á mær, at eg eri sjúk, tí man smílist, er høfligur og ímøtikomandi yvur fyri ørðum.

Eg eigi 5 børn, í aldrinum 16 1/2 til 5 ára gomul. Eg havi arbeitt hart, og hildi, at eg bara eri eitt grenj, tá eg havi følt pínu í kroppinum. Eg minnist einafer, at eg var hjá lækna, og mamma segði við hann, at hettar ber ikki til meira. Læknin spurdi mammu, um tað ikki bara, mundi vera psykist.

Tá man verur settur í bás, uppá hendan hátt, so trýr man tí til endans. Hettar hevði við sær, at tað gingu sera nógv ár, áðrenn eg yvirhøvir tordi at siga við mín lækna, at hettar kann ikki passa. Eg havi meira og meira ilt, og summar dagar fungeri eg ikki. Pínustillandi riggar ikki, og eg sovi einki av berari pínu. Tá hendi endiliga okkurt, og eg bleiv send víðari, og fekk viðgerð. Eg fekk ein heilivág, ið riggaði so mikið val, at eg kundi alt. Eg hevði ilt, men einki eg ikki kláraði. Eg fekk koronu, og eftir tað, riggaði gikta heilivágurin aldrin aftur. Tað bleiv roynt eitt fyri og annað eftir, men eg toldi tað ikki. Pínan bleiv minni, og eg var ikki so hovin, men eg fekk alergiskar reaktiónir, og bleiv so ússalig, at eg var nær um seingja liggjandi til tíðir. Vit royna enn, hesufer eru eftirfylgirnar ikki eins so ógvusligar, men eg klári ikki ein dag, uttan eyka sterkt pínustillandi. Eg eri ikki til arbeiðis, tí eg má antin hava børnini, ella arbeiða, tí eg komi ikki ígjøgnum dagin, um eg skal baði tvey.

Tað er hjarta skerandi, at hoyra sína knapt 7 ára gomlu dóttur siga, “ mamma, kanst tú flatta mær, ella hevur tú tjúkkar fingrar í dag”.

Biologiski heilivágurin er fantastiskur, tá hann riggar. Men sum nú er, er tað ikki nó gott fyri meg. Eg eri bara 40 ár, eg eigi at kunna vera á arbeiðsmarknaðinum í nógv ár avtræt.

Eg eigi, at kunna flatta hári hjá dótturini, tá hon ynskir tað, og ikki bara teir góðu dagarnir. Eg eigi at fanga síl við børninum, spæla í fjørðuni og vera har 120% fyri tey. Men so leingi heilivágurin ikki riggar, riggar mamma ikki 120%.

Eg eri ein av teimun, ið kundi fingið sera góða hjálp, vit at sloppi til Kroatia til viðgerð. Og hevði eg haft møguleikan, so hevði eg við gleði goldið hvørja krónu sjálv. Men sum einlig mamma, og einligur forsyrgjari, og undir almennaverkinum í skrivandi løtu, er hettar als ikki ein møguleiki.

Eg veit ikki hvat landsstýrismaðurin hugsar, men hann skal vera hjartaliga valkomin, at fylgja okkara dagligdegi, og síggja, hvussu hettar oyðuleggur og knúsar eina unga familju.

Julianna Rasmussen

Facebookdagføring dagførd tann 2. september 2022

## **Kirsten Elisabeth Hartmansdóttir** – Frágreiðing um sjúkugongd, væntandi viðgerð og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv

Sum tað allarfysta má eg gera vart við, at eg ikki minnsit øll árstøl og dagfestingar akkurát. Haldið mær tí til góðar, um okkurt ikki er heilt rætt.

Eg vil tó eftir besta førimuni royna at greiða frá míni søgu her:

Eg havi sum ung altíð verið ein aktivur persónur og havi gjørt nógvan ítrótt. Eg spældi hondbólk og róði. Eisini var eg á ítróttarskúla, har eg hevði svimjing sum speciale.

Sum ung hevði eg arbeiði, ið vóru kroppsliga avbjóðandi í nógvar mátar. Eg havi siglt úti og so arbeitt á fiskavirki, meðan hevði sum eykaarbeiði at vera lívbjargari í svimjihylinum eitt tíðarskeið.

Longu um 20 ára aldur byrjaðu fyrstu tekinini av giktasjúkuni at vísa seg, og tað byrjaði eftir fá ár at verða avbjóðandi fyri meg at røkja míni størv til fulnar.

Eg var mangan hjá kommunulækna vegna sera nógva pínu, men gikt varð ikki nevnt, og eg varð ikki send til giktalækna. Soleiðis livdi eg í fleiri ár.

Giktasjúkan gjørdi bara meir og meir um seg, og eg megnaði verri og verri at røkja kropsliga avbjóðandi størv og noyddist eg at finna onnur størv.

Umleið 1988-1989 fekk so starv sum sjúkravikar í skúlanum.

Eg royndi tó mítt besta, og keypti eg hús umleið 1988-1989.

Tá eg var um 35 ára aldur, hevði eg so nógva pínu, at eg var blivin desperat, frustrerað og sera ill.

Eg spurdi tá kommunulæknan, um tað ikki kundi hugsast, at talan var um gikt, nú tveir av mínum beiggjum høvdu giktasjúkuna Morbus Bechterew.

Kommunulæknin sendi meg tá norður til Landssjúkrahúsið, har giktalækni fyrstu ferð staðfesti, at eg eisini hevði giktasjúkuna Morbus Bechterew.

Viðgerðin, eg tá fekk, var Voltaren-pínutablettir, ið bert hjálptu upp á pínu, og bert í ávísa tíð. Onki annað.

Stutt eftir gjørdist eg fyritíðarpensjónist.

Almannastovan virkaði tó fyri, at eg skuldi undir endurútbúgving og koma út á arbeiðsmarknaðin aftur. Tá fekk eg møguleikan at fara á HF, sum eg gjøgnumførdi í 1995.

Ætlanin var so, at eg skuldi fara at lesa til pedagog og fekk tí møguleika at royna meg sum hjálparfólk í barnagarði.

Eg var tó komin so mikið upp í árini tá, at eg ikki slapp inn at lesa.

Sum árini eru liðin, havi eg fingið meiri og meiri pínstillandi heilivág.

Millum annað fekk eg í nógv ár IIbuprofen, sum eg mátti gevast aftur við, tí eg fór at bløða av tí.

Gikt og aðrar sjúkur hanga ofta saman, og nógv ár aftaná, t.v.s. innan seinastu 10 árini, varð eisini staðfest, at eg hevði aðrar fylgitrupulleikar av giktini, sum eg so eisini fái tablettir fyri.

Seinastu árini havi eg eisini fingið slitgikt ella annað, ið ikki er gikt, í høgra knæ og havi sum heild havt tað sera ringt kropsliga av øllum hesum samanlagt, at eg ikki havi megnað at hildið míni hús til fulnar, ella havi megnað at gingið til handils og onnur ørindi. Eg havi verið avhengið av hjálp til so at siga alt.

Seinastu 2-3 árini hevur verið serliga ringt, og noyddist eg at ásanna, at eg slettis ikki kundi klára meg sjálva meir. Eg var tí á vári síðsta ár noydd at selja húsini, ið hava verið mín skansi seinastu næstan 35 árini, og flyta norður til dóttur mína í Hoyvík.

Tá eg kom til Hoyvíkar at búgva, setti dóttirin meg í samband við lækna, sum henvísti meg til giktalæknna á Landssjúkrahúsinum. Nakað efitr kom eg framat hjá giktalækna har.

Har fekk eg útskrivað ymisk nýggj sløg av tablettum fyri gikt, men hesar hava ongantíð hjálpt. Eisini fekk eg fleiri ferð blockadur í bæði knø. Blockadurnar í vinstra knæi hjálptu væl, meðan blockaðurnar í høgra knæ bert hjálptu eitt lítið sindur fyrstuferð, men hareftir slett ikki.

Eg spurdi giktalæknan um møguleika fyri øðrum loysnum, men fekk at vita, at tað kundi taka langa tíð, áðrenn tablettirnar virkaðu, so eg noyddist bara at bíða.

Sjálv las eg meg fram til, at hesar ávísu tablettirnar eiga at vika innan 8-12 vikur, men havi eftirfylgjandi fingið at vita, at hesar tablettir eiga at virka innan 6 vikur. Eisini havi eg fingið upplýst, at hesar tablettir ikki virka fyri Morbus Bechterew, men fyri liðagikt. Nú havi eg tikið tær í áleið eitt ár, men tær eru enn ikki farnar at virka.

Eisini havi eg verið hjá fysioterapeuti og fingið venjingar at gera. Tær hjálpa heldur ikki. Eg havi so nógva pínu, at eg illa nokk fái gjørt venjingarnar.

Dóttir mín hevði hoyrt um annan privatan giktalækna í Føroyum við nógvum royndum, og orsakað av, at eg eri so forpínd hvønn dag, fyrisló hon, at eg skuldi fara at tosa við hendan giktalækna eisini.

Hesin giktalæknin metti, at eg átti at fingið biologiskan heilivág og gav mær eina sproytu av binyrebarkhormon í lendan og segði, at sproytan ikki tekur pínu vegna slitgikt, men tekur harafturímóti pínu, ið kemur av Morbus bechterew og/ella aðrari gikt, ið ikki er slitgikt.

Eisini segði hann, at ta pínuna, sum sproytan tók, kundi biologiskur heilivágur eisini taka.

Hann kundi tó ikki útskriva mær biologiskan heilivág.

Næsta dag var eg pínufrí í øllum kroppinum undantikið høgra knæi, sum jú er rakt av slitgikt ella øðrum, sum ikki er gikt.

Sproytan hjálpti mær í heilar 6 vikur, har eg kendi meg sum eitt menniskja aftur og kundi knappliga røra meg aftur uttan nógvu pínuna.

Binyrebarkhormon er tó ein stokkut gleði og ongin varandi loysn. Hetta er ikki heilivágur, sum ein kann taka fast í longdini.

Í dag siti eg so aftur meir ella minni sum ein grønsak heima hjá dóttrini- óhjálpin við nógvari pínu og so at siga ongari lívsgleði. Og eg eri altso bert 69 ára gomul!

Viðtalan hjá privata giktalæknanum fekk meg at hugsa meira um biologiska heilivágin og fáa eina vón um, at onkur hjálp er hjá mær at heinta.

Eg havi síðani frætt, at biologiskur heilivágur hevur verið á marknaðinum í Føroyum síðani 2002, og at fleiri giktasjúklingar fáa biologiskan heilivág. Ongin annar lækni hevur tó nakrantíð fyrr nevnt hetta fyri mær sum eina møguliga loysn fyri meg, hóast onki annnað hjálpir hjá mær.

Eg standi tí spyrjandi: Hví hevur ongin bjóðað mær at roynt biologiskan heilivág, tá tað eru sannlíkingi fyri, at tað fer at hjálpa mær, nú onki annað hjálpir? Er tað aldurin?

Eg havi eins og øll onnur rætt til ta læknaliga hjálp og viðgerð, ið virkar!

Eg vil tí staðiliga heita á leiðslu Landssjúkrahúsins um at seta Pero Soré aftur í starv sum giktalækna á Landssjúkrahúsinum, so eg kann fáa heilivág, sum kann hjálpa mær, og harvið fáa eitt virðiligt lív aftur.

Kirsten Elisabeth Hartmansdóttir.

**Mariann S. Poulsen** – Ónøgdsemi um eina giktadeild, sum “er í sorli”, og um raðfestingar av konsulentum, framum giktalækna Pero Soré

Hey

Eg havi havt morbus bectrew í nógv ár! Veit ikki akkurat dag og tíma, tá eg fekk boðini. Men eg hevði øgiliga pínu í lendunum, nakkanum og øðrum liðum, eg bleiv send til Per og Pól, eingin kundi siga, hvat feilti mær!

Men fyri uml. 12-13 árum síðani, var eg so heppin at sleppa frammat hjá Pero Sore! Longu til fyrstu viðtaluna, kundi hann siga mær hvat feilti, og setti meg í medicinska viðgerð.

Eg kundi til eina og hvørja tíð ringja til giktadeildina og fáa hjálp. Elsa (sjúkrasysturin) og Pero vóru ongantíð longri burtur enn ein telefonsamrøða!

Eg eri ein av teimum sjúklingunum, sum havi verið og eri super sensitiv/allergisk fyri øllum medicini.

Eg havi magan havt akut brúk fyri hjálp! Og eg fekk ALTÍÐ hjálp frá Pero og/ella Elsu, tað var ongantíð eitt ivamál, um eg kundi fáa hjálp!! Tey vistu bæði hvat feilti mær, hvat fyri medicin eg tók, hvat bivirkningarnir kundu verða osfr!

Tá einki medicin riggaði, sendi Pero meg og aðrar sjúklingar til Kroatia til viðgerðar. Ein viðgerð sum var fantastik, og gjørdi, at eg var pínufrí í nakrar md um ári, men sum nú er spard burtur!

Sum nú er liggur giktadeildin í sorli!

Læknin er uppsagdur og sjúkrasystrurin er farin! LS importerar hunda dýrar konsulentar, meðan ein giktalækni, sum kennir og veit tað sum er vert at vita um sjúklinganar ikki sleppir til arbeiðis á LS!!

Mariann S. Poulsen

**Mary Kirstenardóttir Cazabon** – Frágreiðing sum avvarðandi, um mammuna, sum er illa stilla orsaka av gikt, og um hvussu farið verður fram, fyri at fáa viðgerð

Eg vil hervið royna at lýsa, hvussu kensluliga hart tað er at vera avvarðandi hjá einum menniskja, ið er hart rakt av gikt- mammu míni.

Alt, eg minnist, hevur mamma verið nógv pínd av gikt og øllum tí, sum har fylgir við.

Eg minnist millum annað, at longu tá eg var smágenta, vóru nógvar nætur, har mamma ikki fekk sovið og græt av pínu, og har eg royndi at troysta mammu, hóast eg tá ikki visti, hví mamma græt, ella hví hon hevði ilt.

Hóast nógvu pínuna, hevur mamma allan mín barndóm, ungdóm og stóran part av mínum vaksna lívi verið ein sterk, røsk, aktiv og útvend kvinna, sum fyri tað mesta royndi at vera glað og ikki lata pínuna stýa lívinum, hóast hon altíð hevur havt ringa pínu.

Hon luttók mangan í ymiskum stuttligum og spennandi og royndi sum frægast at liva og ikki lata giktina koppa sær.

Giktin setti tó fleiri forðingar fyri mammu í tí dagliga...

Mamma hevur altíð havt sera góð handalig evni til at seyma, binda, brodera og tekna.

Hetta gjørdi hon tó sera lítið av, tí hon visti, at um hon setti seg at gera okkurt av hesum, blussaði pínan upp.

Mamma teknaði tó eina ferð við kolblýanti ein málning av mær sum pinkubarni og pápa mínum, har hann situr og nanar mær. Málningurin var so ektaður og vælgjørdiúr. Vakrari málning havi eg aldrin sæð.

Serliga at binda plagg, sum ofta tekur langa tíð, helt hon seg burtur frá. Av tí sama bant mamma mær ikki troyggjur og onnur pløgg, sum nógvar aðrar mammur binda upp á síni børn.

At leggja onkrar buksur upp hætti hon sær tó, tí hetta tók ikki so langa tíð.

Tá eg keypti mær føroyska búnan, spurdi eg tó mammu, um hon vildi brodera fyri- og turriklæðið til mín.

Føroyski búnin er jú nakað heilt serligt, og sjálvandi vildi mamma gleða meg við at seta sín dám á mín búna, og hevði tað sera stórt virði fyri meg at kunna siga, at mamma hevði broderað fyri- og turriklæðið til mín búna.

Sjálv valdi eg litir, og tá liðugt varð broderað, var hvør lítil smálutur so væl frágingin, at ongin kundi gjørt hetta hondverkið betur enn júst mamma mín. Tað var akkurát so, sum eg ynskti tað.

Seinastu nógvu árini hevur hon verið bundin av hjálp. Tí var tað ein sjálvfylgja, at tá eg var heima, hjálppti eg mammu so nógv, eg kundi. Eg fór til handils og gjørdi onnur ørindi, gjørdi reint og klipti av og á trø og annað uttandurðaarbeiði.

Eisini havi eg hjálpt henni at sloppið framat hjá lækna og í viðgerð fyri giktina.

So við og við fekk mamma størri og størri tørv á míni hjálp til alsamt fleiri ting, og lívsgleðin hjá mammu er somuleiðis við tíðini fánað meir og meir, ja nú næstan niður í onki.

Á vári 2022 var mamma so ring, at hon ikki megnaði at ganga trappurnar upp á loftið í húsunum, har kamarið og baðirúmið var. Eg hjálpti tí mammu at selja húsini og fór suður og ruddaði út í sambandi við søluna. Húsini vórðu tóm innan 24 tímar, og tók eg mammu norður til Hoyvíkar til mín at vera.

Komin norðurum, hjálpti eg mammu at koma framat hjá lækna, sum sendi hana víðari til giktalækna, har hon fekk annan heilivág. Tó so, hevur heilivágurin ikki hjálpt, hóast hon hevur tikið hann í áleið eitt ár nú.

Pínuna merkir mamma hvønn einasta dag, og hetta tekur alla hennara lívsgleði, av tí hon ikki megnar nakað.

Mamma hevur tí, síðani hon kom til Havnar, meir ella minni bara sitið í stovuni.

Vit onnur í húskinum arbeiða og ganga í skúla dagliga, og allar teir tímarnar situr mamma bara einsamøll heima. Hon kann ikki fara út sjálv, tí hon fær so illa gingið.

Ein avleiðing av øllum hesum er, at mamma ikki verður stimbrað á nakran. Hvussu kann ein stimbrast av at sita einsamallur í einum stóli meginpartin av degnum.

Øll henda støðan er barasta ikki til at halda út!

Eg havi eisini skrivað til giktalæknan um hesa ótolandi støðu, men mamma er enn ikki komin framat til viðtalu.

Heilivágurin hjálpti ongantíð, og eg orkaði ikki longur bara at standa hjálparleys og hyggja at uttan at royna okkurt. Eg var sum avvarandi sera kedd og desperat mammusa vegna.

So eg setti meg í samband við annan sera royndan giktalækna fyri at fáa eina ”second opinion” og vita, um nakað kann gerast fyri mammu, tí hendan støðan er barasta ikki til at halda út!

Har fingu vit at vita, at mamma átti at fingið biologiskan heilivág, og at mest sannlíkt fór at virka. Eisini fekk hon eina sproytu av binyrekarkhormon í lendan, og næsta dag var mamma sum eitt nýtt menniskja næstu 6 vikurnar, tá sproytan síðani gavst við at virka.

Vit høvdu 6 fantastiskar vikur saman, har eg tók mammu við til ymiskt, so sum til Klaksvíkar í svimjihylin og fantastiska wellnness-økið har, ið eisini bjóðar infrareyðar strálur.

Tað er tó sera ringt nú eftir tær 6 vikuranar at síggja mammu- aftur sitandi í stólinum í óúthaldiligu pínustøðuni.

Eftir vitjanina hjá privata giktalæknanum kendi eg tó sum avvarandi, at vit vórðu hoyrdar, og at ein vón var fyri framman hjá mammu. Ein vón um eitt virðiligt lív við hesi varandi og pínufullu sjúku.

Tað er óalmindiliga hart at vera avvarandi hjá einum, ið er raktur so hart av gikt.

Tað nívir meg at síggja mína einaferð so sterku, røsku og glaðu mammu, sum plagdi at vera við til ymiskt, nú sita í einum stóli heima- hjálparleys og svinna burtur.

Eg síggi, at so hvørt sum pínan veksur, so hvørt minkar lívsgleðin hjá mammu.

Mamma sleppur tíðanbetur skjótt framat hjá giktalæknanum á Landssjúkrahúsinum aftur, og vónandi fær hon tá biologiskan heilivág, so hon kann fáa eitt virðiligt lív aftur.

Tað kann ikki vera rætt, at menniskju skulu tvingast at pínast og taka heilivág, sum ikki hjálpir, tá har finst heilivágur, ið mest sannlíkt hjálpur einum til eitt pínufríðari og virðiligari lív, og tí er eina roynd verdur!

Vinarliga, Mary Kirstenardóttir Cazabon.

**Nora Maria Gærdbo** – Frágreiðing um sjúkustøðu

## Viðvíkjandi giktastøðuna hjá mær.

Sum smágenta havi eg havt ilt í kroppinum, sum bara er versnað og versnað við árunum.

Ferð eftir ferð eri eg blivin avvíst av mínum kommunulækna at sleppa til kanningar.

Fyri 3 árum síðani fór eg til privatan giktalækna og fekk staðfest morbus Bechterew.

Síðani havi eg roynt ymiskan giktaheilivág og nógv pínustillandi men einki hevur hjálpt.

Mín gerandisdagur er nógv merktur av hesi sjúku. Síðani eg fekk tað staðfest eri eg farin í læru sum rørsmiður men møðin og pínan gera tað sera trupult at klára mítt arbeiði.

Hendan sjúkan tekur øgiliga hart uppá meg sálarliga og ávirkar ikki bert meg sjálva men eisini míni nærmastu.

Vinarliga heilsan

Nora Maria Gærdbo

**Óli S. Poulsen** – Søga hjá avvarðandi og úttalilsi um eitt giktaøki, sum stendur í hóttafalli, Facebookdagføring

## Mamma er sjúk!

Mamma hevur verið sjúk so leingi, sum eg minnist. Tað er tó versnað við tíðini. Hon vísir tað ikki fyri tí almenna, men her heima ávirkast alt húskið av, at hon ikki klárar ymsar uppgávur. Tað er ferð eftir ferð, at hon leggur seg niður at slappa av, og hevur ikki møguleika at reisa seg sjálv uppaftur vegna pínu. Hon er noydd at fáa hjálp frá pápa ella okkum børnum bara fyri at reisa seg upp. Hon bæði stívnar og livir við nógvari pínu hvønn dag.

Mamma kemur eisini ferð eftir ferð heim við nýggjum heilivági sum læknarnir "vilja prøva" við henni. Eftir hondini kennist tað, sum mamma hevur eitt apotekslagur av heilivági heima hjá okkum. Tað virkar tó sum einki riggar. Tað følist sum mamma bert er ein test kanin.

Tað er einki nýtt, at hiti og sól er gott fyri giktasjúkur. Tá mamma fekk tilboðið frá Pero Sore at sleppa til Kroatia til viðgerðar, var eg optimistiksur tí nú hendi okkurt. Eg minnist enn, tá hon fyri fyrstuferð kom heim eftir 4 vikur í Kroatia. Hon var ikki til at kenna aftur. Hon var bæði fimari og sá nógv frískari út. Hetta hava vit, familjan, verið ógvuliga takksom fyri. Tað hevur eisini havt sína positiva ávirkan á familjuna.

Í nøkur ár hevur hon verið í Kroatia á viðgerðarstovninum. Úrslitið hevur víst seg at vera avbera gott hvørt ár, har hon hevur fingið hetta tilboðið. Vit vónaðu, at hetta fór at halda áfram, tí sum tað vísur seg, hjálpir lívfrøðiligi heilivágurin ikki. Eitt av tingunum, sum lívfrøðiligi heilivágurin leggur eftir sær, eru hjáárinini. Mamma tolir als ikki lívfrøðiliga heilivágin. Meiri enn einaferð er hon endað á skaðastovuni, tí at hon fekk eina ógvisliga allergiska reaktión.

Tað sýnist sum gikta sjúklingarnir eru sleptir á fjall, og tilboðið bara er fallið burtur. Og so má hon bara halda seg til lívfrøðiliga heilivágin, sum ikki riggar, og sum hon ikki tolir... ergiligt...

Óli S. Poulsen

Facebookdagføring dagførd tann 2. september 2022

**Rógvi Beder –** Átala handfaring av diagnostisering, sum varð sett í dag

## Diagnosur skulu ikki gevast yvir telefon!

Eg havi í nógv ár stríðst við pínu í rygginum og í hondliðinum, og havi gingið aftur og fram hjá lækna, inntil eg endiliga skuldi í MR skannaran. Tann 16. Januar í ár var eg so í skannaranum, har eg fekk at vita, at tað fór at taka í hvørtfall eina viku at fáa svar. Eg havi síðan tá ringt so ofta, at eg havi mist tali, og spurt eftir úrsliti, og einaferð aftaná fleiri royndir (møguliga fyrst í mars), fekk eg at vita, at eg skuldi fáa svar í viku 16. Men vika 16 kom, men har kom onki svar.

Í síðstu viku tá eg ringdi, fekk eg at vita, at tey fóru at ringja til mín í hesari vikuni. Men frá tá eg í síðstu viku ringdi og til í gjár, havi eg havt so nógva pínu, at eg hvørki havi sovið ella havt matarlyst, og hetta fekk bikarið hjá mammu at flóta yvir, so hon valdi at taka stýringina.

Gjáramorgunin ringdi hon til reumatologisku deild, har hon fekk at vita, at læknin skuldi hava meg til telefonsamtalu seinnapartin í gjár. Hon spurdi so skrivaran: “hvussu væntar tú at ein 20 ára gamal drongur dugir at siga boðini víðari?” og “hvussu nógvar spurningar væntar tú at hann (eg) fer at stilla?”

Mamma gjørdi krav uppá eina veruliga samtalu, sum hon kundi koma við til. Skrivarin á reumatologisku deild lovaði at siga frá, um okkurt avboð kom, men tað segði mamma ikki var gott nokk, og skrivarin segði at hon skuldi kanna tað. Eina løtu seinni ringdi hon til mín, og gav mær tíð til samtalu í dag.

Í dag (9 mai 2023) havi eg so verið hjá einum konsulenti. Eg hevði mammu mína og beiggja mín við. Vit høvdu tosað um, hvørji boðini fóru at vera, men vit vóru øll heilt sikkur í, at onki fór at vera at síggja á skanningunum, tí annars hevði giktadeildin ikki ætla at givið mær boð yvir telefonina.

Men hvat? Klokkan 12 í dag fekk eg staðfest Morbus Bechterew. Hetta vóru boðini, sum giktadeildin ætlaði, at eg skuldi fáa yvir telefon.

Eg veit væl hvat Morbus Bechterew er, tí eg havi ein beiggja, sum er illa plágaður av tí, og eg veit hvussu tað sær út at hava eina sovariga sjúku. Hetta er ein diagnosa, sum vendir alt lívið á høvdið, og hetta ætlaðu tit at fortelja mær yvir telefonina.

Eg haldi, at um tit ætla at geva álvarsligar diagnosur yvir telefon, so skulu tit bara spara tykkum ómakin, og senda eini SMS-boð í staðin. Eg eri fúkandi illur, og havi hug at spyrja hvat tit billa tykkum inn, at behandla meg soleiðis!

Rógvi Beder

P.s. mamma spurdi eisini skrivaran, hví tað tók so langa tíð at fáa svar frá skannaranum, og svarið var “eg veit ikki”. Ongin umbering uppá hesa óneyðugu bíðitíðina, har Landssjúkrahúsið ikki hevur hildið sítt lyfti um at fáa svar eina viku eftir skanning, og heldur ongin umbering um ikki at halda avtaluna í viku 16.

Eg vil eisini leggja afturat, at eg kendi meg væl viðfarnan av sjálvum læknanum, tá eg kom á staðið, sjálvt um hann sá út til at hava trupulleikar við programminum á telduni. Men eg eri skelkaður yvir ætlanina um at geva mær hesi boð yvir telefonina, og hetta er slett ikki í ordan.

**Rósa Gaardlykke Egholm** – Afturmelding um konsulentskipanina

## Tá eg umsíðir fekk tíð hjá reumatologinum!

Í nógv ár, hevur pína og møði verið partur av mínum gerandisdegi. Í nógv ár, havi eg leita eftir svari. Hví eg havi tað so? Hví tað skal vera so torført at fáa ein gerandisdag at hanga saman, vegna serliga nógva pínu í rygg og lendum? Hví eri eg so troytt allatíð?

Í 2009 flutti eg til Aalborg, og setti meg tá ið samband við tann kommunlækna eg fekk har. Har bleiv eg eisini kanna. Eftir drúgva tíð – í 2014 var mistanki um gikt. Bleiv síðan ávíst til giktalækna. Síðst í novembur í 2014 slapp eg framat har, og læknin sá við ultraljóði okkurt í føttliðum, handliðum og lendum. Hann ynski at fáa eina MR skanning av kroppinum. Mistanki varð um psoriasisgikt.

Eg gjørdist so við barn, og øll útgreining bleiv sett á pausu.

Eftir at dóttirin var fødd, valdu vit at flyta aftur til Føroyar. Tað var ikki í mínum tonkum, at tað skuldi vera so trupult at sleppa framat hjá reumatologum á Landsjúkrahúsinum.

Eg setti meg í samband við egnan lækna í Føroyum, og ávísing var gjørd til Landsjúkrahúsið. Aldrin kom ein svar frá teimum.

Í 2018 var eg so óheppin at vera í einum ferðsluóhappi, har eg fekk ein ógvusligan heilaskjálvta. Í langa tíð, vóru árinini so ring, at orka var ikki til at hugsa um eina útgreining fyri gikt.

Tíðin gongur, og tær fylgir, sum hava verið við høvdinum er komnar í eina rætta legu, við hjálp av heilivági.

Hetta leiðir tankarnar aftur til ta pínu og møði sum annars er.

Í 2021 setti eg meg aftur í samband við egnan kommunulækna. Hon helt eisini, at tað var tørvur á útgreining fyri gikt. Ávísing varð aftur send, men ikki fyrr enn í januar 2023, eftir at eg og kommunulækni hava ringt og skriva fleiri ferð, bleiv ein tíð sett av.

10 februar 2023 slapp eg endiliga framat. Fekk tíð hjá einum donskum konsulenti. Eg møti upp, spent og nervøs, men glað um, at nú endiliga er gongd komin á aftur útgreiningina fyri gikt.

Eftir nakrar fáar minuttir, sigur læknin at hann veit hvat mær feilar. Nakað bilsin blívi eg, tí eg føli ikki at eg havi sagt annað, enn at eg havi havt pínu síðan eg var 18 ár. Fibromyalgi, sigur hann tað er. Enn meira bilsin gerist eg, tí eg kennist ikki við hesa diagnosu. Tíbetur, hevði eg fylgjara við til hesa viðtalu. Hon sigur beinanveg, at tað kann man ikki staðfesta, uttan alt annað er kanna. Eg kenni meg sera kedda í støðuni, og gráti illa. Føli slett ikki at læknin hevur hoyrt meg, sæð ella kanna meg. Hetta

roynir mín fylgjari at siga fyri meg. Og eftir eina langa viðtalu – og eftir mínum tykki ein sera ómenniskjalig viðtala - , gongur hann so við til at senda meg í MR skannara.

Eftir viðtaluna, setti fylgjarin hjá mær, seg í samband við skrivararnir hjá reumatologunum. Greiddi frá okkara uppliving. Vit sótu eftir við eini kenslu av, at læknin ikki hevði áhuga í at møta mær. Ynski varð lagt fram um, at fáa eina nýggja tíð, tá svar uppá MR skanning kom aftur.

17 apríl 2023 fekk eg nýggja tíð hjá reumatologunum. Valdi eisini hesu ferð at hava fylgjara við.

Kom til ein annan danskan konsulent. Hann virkar at byrja við, eitt sindur øðrvísi enn hin læknin. Hann spyr hví eg eri har. Byrjaði at greiða frá, men eftir stutta tíð, tekur hann yvir samrøðuna.

Staðfestir at eg havi Fibromyalgi. Eisini greiðir hann frá, at hann arbeiðir á einasta staðnum í danska kongaríkinum, sum arbeiðir við Fibromyalgi. Nú skuldi eg heim at googla uppá hesa diagnosu, og læra at liva við pínuni.

Eg øsi meg upp. Tað kann ikki vera rætt, at tað er soleiðis man verður møttur, tá ið man kemur til ein serlækna. Hetta sigi eg eisini við hann, men tað sýnist ikki at raka við. Fylgjarin, sum er róligur, spyr forvitin inn til har læknin arbeiðir, um hann kann koma við hansara vitan um Fibromyalgi. Undir øllum umstøðum, er tørvur á, at fáa at vita hvat tað inniber, og hvussu eg kann liva mítt lív við tí pínu eg havi dagliga. Hetta øsir læknan nógv. Hann nærum kemur upp úr stólinum, og sigur at nú bleiv hann sera provokeraður. Hann hevur greitt frá hvat tað er, og at eg nú skal fara á heimasíðuna hjá giktafelagnum.

Tá ið spurt verður inn til, um hann heldur tað kundi verið gott at ávíst meg til Pínuklinikk, sigur hann at tað er nakað fjas, og tað nyttar onki *"du vil bare blive bedugget"*. Hann endar sína viðtalu við at leggja afturat og vísa á – sum eg upplivdi tað – sína makt. *"Det kan godt være at du er psykolog, men jeg er læge"*.

Í dag, siti eg eftir við eini kenslu av enn størri avmakt enn áðrenn. Hvat skal eg nú? Um servitanin, sum er á Landsjúkrahúsinum ikki kann hjálpa mær, hvør kann so?

Rósa Gaardlykke Egholm

**Terji Beder** – Áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv

# Áheitan frá mær sum borgara um at seta Pero Soré aftur í starv sum giktalækna á Landssjúkrahúsinum

Eg eri ikki ein av teimum, sum verður raktur av, at áður virkandi giktalækni, Pero Soré, ikki longur er í starvi sum giktalækni í Føroyum. Eg eri millum tey hepnu, sum enn hava ein fastan giktalækna í Føroyum, og hann eri eg glaður fyri at hava. Men hóast eg ikki verið raktur persónliga, so eri eg ein borgari við gikt, sum fær ilt fyri bróstið, tá ið eg síggi frustratiónirnar og tann ótryggleika, sum mínir meðborgarar við gikt ganga við, tí teir á ein ella annan hátt eru raktir av hesari støðuni.

Síðan samstarvið millum Landssjúkrahúsið og Pero Soré í fjør endaði, hevur telefonin hjá Giktafelagnum og okkara privattelefonir verið reyðgløðandi. Reyðgløðandi av fólkum, sum í stórari frustratión spyrja um málið um giktalæknan, við vón um at fáa hann aftur í starv. Tað er ikki bert giktatelefonin og privattelefonirnar, sum gløða, men hesi fólkini ringja eisini áhaldandi á mína arbeiðstelefon - meira enn so eisini í arbeiðstíð - og tey skriva á Facebook, senda teldupostar og steðga einum á gøtuni.

Í hesum uppringingum og áheitanum er ein greiður felagsnevnari. Fólk kenna seg ótrygg og tey kenna seg slept á fjall. Hetta tí tey antin hava mist sín giktalækna, hava havt eina keðiliga uppliving við einum konsulenti ella tí tey spyrja um hvussu tey kunnu sleppa framat einum giktalækna, tí tey orsaka av pínu ikki megna bíðitíðina sum er, tá ið illgruni er um gikt.

Ein konsulentskipan er betri enn onki, men um eg skal taka hesi fólk fyri fult, sum eg einans havi orsøk til at gera, so tykist hendan skipanin at virka alt annað enn væl. Men eg eri tó eisini varðugur við, at fólk ikki ringja, um tey hava havt eina góða uppliving, og sjálvandi eru eisini góðar upplivingar, hóast hetta í minni mun kemur mær og okkum fyri oyra.

At koma til ein konsulent, líkist nógv støðuni í teimum økjum kring landi, har ongin kommunulækni er. Tað er møtumikið ikki at vita, hvørjum tað er, tú møtir, og enn meira so at skula forklára sína støðu og sjúkrasøgu av nýggjum hvørjaferð. At læknarnir, sum ein kemur til, ikki sjálvir kunnu uppbyggja sær ein historikk hjá sjúklingunum, tyngir um viðtalurnar, og læknarnir kunnu ikki sita við einari veruligari fatan av tí reellu støðuni, um teir ikki hava sæð sjúklingin ígjøgnum tey ymisku stigini av sjúkugongdini, sum t.d. kropsliga regressión, yvirviðkvæmi í mun til heilivág, v.m.. Tá tað vendir soleiðis, er góð orsøk at spyrja, hvussu góð viðgerðin tá verður.

Um konsulentanir ikki kunnu veita viðgerð á sama støði, sum læknar á staðnum, er talan um ójøvn tilboð millum sjúklingar, sum hava ein fastan giktalækna, og sjúklingar, sum ikki hava ein fastan giktalækna, men mugu dúva uppá útlendskar konsulentar. Harvið hava vit innan giktaøkið A- og B-sjúklingar, og tað er ikki nøktandi.

Eg havi ikki biðið um innlit í hvat konsulentskipanin kostar, men hon kann neppa vera bíligari enn at hava ein fastan lækna. Fyri at kunna forsvara eina slíka skipan fíggjarliga, má konsulentskipanin í minsta lagi vera bíligari enn at hava ein fastan giktalækna. Ikki bert bíligari í krónum og oyrum, men hon má vera tilsvarandi bíligari sum góðskan í viðgerðini lækkar.

Harafturat meti eg eisini, at tað krevst ein framúrskarandi góð orsøk til at rættvísgera ikki at brúka tær arbeiðskreftir, sum longu eru her á landi, og sum eru serkøn fyri tað føroyska giktaøkið - serliga tá ið ein lækni sum Pero Soré fegin vil sleppa aftur til arbeiðis. At Landssjúkrahúsið her skal standa í vegin fyri læknanum, er nakað, sum ávirkar okkum sum brúkarar, og tað er øgiliga skjótt, at hetta eisini kostar á øðrum kontum hjá samfelagnum, eitt nú við at sjúklingarnir gerast tyngri, og harvið meira útsettir fyri at enda við fyritíðarpensjón ella tillagaðum starvi, har giktasjúklingar longu eru væl umboðaðir.

Í øllum rokinum, sum hevur verið í hesum málinum, hevur verið sagt, at álitið á Pero Soré er somikið skatt, at tað ikki ber til at taka samstarvið millum Landssjúkrahúsið og giktalæknan upp aftur. Hetta hóast Pero Soré hevur starvast á Landssjúkrahúsinum í yvir 25 ár, tá álit má sigast at hava verið á honum sum lækna.

At alt álitið kann verða somikið illa skatt, at tað er óbótaligt, tykist mær løgið, og er hetta í mínum eygum tekin um eina viðbrekna skipan, sum illa kann fungera, um ósemjur av persónligum slag kunnu gera so stóran skaða fyri eina skipan, sum hóast alt er til fyri okkum sum sjúklingar. Landssjúkrahúsið er eitt av landsins størstu arbeiðsplássum, og kann tað ikki rúma ósemjum millum starvsfólk, so er hetta eitt úttrykk fyri einum trongum og veikum, møguliga sjúkum, sjúkrahúsi, sum ikki sømir seg fyri okkara samfelag. Hetta er rætt og slætt ov vánaligt, og um heil økir kunnu fara soleiðis fyri skeytið, á tí, sum má betragtast at vera á bakatellstøði, jamen so er hetta eisini eitt úttrykk fyri, at vit í Føroyum ikki eru búgvin til at hava eitt samlað sjúkrahúsverk, men heldur áttu at bakka til eina skipan við trimum óheftum sjúkrahúsum.

Tí haldi eg, at tíðin er komin, at allar stríðsøksir vera lagdar, og at fólk, sum eru særd í gongdini, taka í hondina á hvørjum øðrum, sum vaksin fólk, og fyrigeva hvørjum øðrum. Hetta vil vera mín inniliga áheitan.

Terji Beder,

giktraktur borgari.

## **Tove Askham** – Afturmelding og lýsing av ræðandi uppliving við konsulentskipanini og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv

Tann 20. oktober 2022 var eg hjá giktalækna á LS, tað var ein dani. Eg hevði havt pausu frá giktaheilivági (arava), tí eg fekk eina skurðviðgerð síðst í mai 2022, og tað vardi nokkso leingi, til heilivágurin virkaði aftur, so eg bað danska giktalæknan um at fáa eina sproytu, sum plagar at seta ferð á virkningin av arava. Eg bleiv so sjúk av hesi sproytuni uml. 1 tíma aftaná, at eg mátti út aftur á LS við sjúkrabilinum. Skaðastovan bleiv við at spyrja meg um, hvat eg hevði fingið av heilivági, men tað visti eg ikki, bað tey hyggja sjálv, tí eg hevði spoytuna beint áðrenn á LS. Tey sóðu einki, so læknin hevði ikki skrivað tað inn. Ikki serliga skilagott.

Eg ynski inniliga, at Pero kemur aftur í starv, hann er so dugnaligur.

Vinaliga

Tove Askham

**Tove Ellingsgaard** – Úttalilsi um sjúkrastøðu og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv, Facebookdagføring

Hey!! Eg eri psoriasis - gikta og fibromyalgi sjúklingur.

Heilsumálaráði við Kaj Leo Holm Jóhannesen sum formannin Hava tikið eina SO stóra og skeiva avgerð!!

Vit eru 3 bólkar sum onga hjálp fáa, uttan so vit tola biologiskt medisin. Biologiskt med. ljóðar ordiliga gott ha? Men men, hjáarinini kunnu vera sera oyleggjandi fyri nógv! Eg eri bara ein av nógvum, sum ikki tola biologisk med. Ella kunstiga sól ( til psoriasis) Einasta hjálp eg og nógv við mær hava fingið, og sum virkar sera væl er klimaviðgerð í Kroatia!!

Eitt sindur um klimaviðgerð.

Fyri tað fyrsta, er tað absalutt ikki ein feria sum onkur hevur sagt. Tað er Hart arb. Vit byrja viðgerðuna tann dagin vit koma, og hvønn dag byrja viðgerðurna kl.08 og til kl. 17-18 og onkuntíð aftaná tað. Við onkrum steðgi. Viðgerðurnar eru sera effektivar, og hjálpa sera væl hjá øllum!! Hjá mær sum psoriassis og giktasjúklingur fái eg eitt heilt annað lív, eg kann vera frísk upp til eitt ár, og onkuntíð meira, og ikki taka nakað biologisk medisin ( fekk at vita frá lækna, at hjárinini kundu vera krabbi!! og tað skulu vit sproyta í okkum ??)

At taka klimaviðgerðuna burtur, er ein katastrofa!! Tað ger tað, at ein stórur partur av fólkið ONGA viðgerð fær yvirhøvur!! Tað ber við sær, at vit koma at brüka læknar og LSH. nógv meira enn neyðugt!!

Í Føroyum er EIN rúgva av giktasjúklingum, og EIN giktalækni!! Bíðitíðin at sleppa til giktalækna kann vera upp til hálvtannað ár og meira!

PERO SORE kennir okkum giktafólk sera væl, SETI HANN AFTUR Í STARV!!! Og IKKI seta onkran vikarlækna í staðin, sum ikki ánar nakað um okkum og okkara støgu!!

Avgerðin at avtaka klimaviðgerðuna er ein katastrofa!! Eg fái ABSALUTT onga hjálp í FO. og eg eri tíverri ikki einsamøll !!

Pengar!! ja, tað mugu vit eisini tosa um!! Ein biologisk sproyta kostar frá 70.000kr og upp til 300.000 kr fyri ein persón í eitt ár! Klimaviðgerð í 4 vikur alt íroknað, kostar uml. 40-45.000kr og tað vil Kaj Leo IKKI geva okkum! Vit gjalda øll skatt!!

Hettar eru myndir av mær áðrenn og aftaná eg havi verið í klimaviðgerð í Kroatia. Ikki bara armarnir, men allur kroppurin. + allar viðgerðirnar fyri gikt og fibromyalgi. Fibromyalgi vilja

nógvir læknar í Føroyum ikki vilja góðtaka sum eina sjúku!! Kanska skuldu læknarnir lesa hvat WHO. skrivar um tað!

Vinarliga heilsan Tove Ellingsgaard

Facebookdagføring dagførd 2. september 2022

**Vanja K. Joensen** – Afturmelding um konsulentskipanina og áheitan um at seta Pero Soré aftur í starv

Hey

Eg síggi at tit biðja um afturmeldingar um giktaøkið í núverandi støðu, so her komi eg við mínari afturmelding

Haldi tað er deiligt, at tit biðja um hetta, tí eg haldi als ikki at støðan við konsulenti ísaðin fyri Pero Sore er nøktandi.

Eg fekk staðfest MB í 2011, eftir at hava verið sjúk í 6 ár. Tað var Pero, sum staðfesti sjúkuna. Havi síðani gingið regluliga hjá honum, og eg havi verið sera væl nøgd við hann sum lækna, og havi følt meg í tryggum hondum.

Havi tikið ymsan biologiskan heilivág síðani 2016, og sum við øllum- tað hevur hjálpt eina tíð, til tað ikki riggaði, og so umaftur…aftur eitt nýtt slag osv.

Tað er ein balansugongd við viðgerð og sjúku allatíðina.

Pero hevur verið væl fyrireikaður til hvørja viðtalu, og hevur fylgt upp uppá undanfarnu viðtalu og blóðroyndir. Eg havi verið sera væl nøgd við hann sum lækna, tí eg havi følt meg í góðum læknaligum hondum.

Nú havi eg so verið hjá einum konsulenti, ið hvørki skilti ella tosaði føroyskt. Føldi avgjørt ikki at hon var serliga fyrireikað uppá viðtaluna. Eg mátti greiða frá nógvum umaftur, ið ikki hevði verið neyðugt, um Pero framvegis var mín lækni. Hon hevði ikki sett seg inn í mína sjúkrasøgu ella blóðroyndir. Eg hevði nakrar spurningar viðvíkjandi sjúkuni, viðgerðini og hjáarinum og svarið var annaðhvørt “det ved jeg ikke” ella "det må du snakke med din kommunelæge om". Umframt at hon bað meg fara til blóðprøvar um nakrar mðr, men sum ikki samsvaraði við mína viðgerðargongd annars. Eg føldi meg avgjørt ikki serliga væl, tá eg fór út aftur, og hugsaði at eg eins væl kundi eg verið farin í SMS og spurt onkran heilt tilvildarligan persón har!! Eg havi síðani spurt um eg kann sleppa til Jóhan Petur Weihe, men hann hevði ovmikið at gera, so tað bar ikki til.

Sum áður nevnt, haldi eg als ikki at støðan er nøktandi. Sum persónur við einari kroniskari sjúku, har pína, fylgissjúkur og óendalig møði eru partur av lívinum, umframt heilivágur, ið annaðhvørt riggar - ella ikki, er tað heilt forferdliga keðiligt at skifta lækna. Tá er av alstórum týdningi, at eg kann føla meg at vera í tryggum læknaligum hondum og vera fortrólig við læknan, sum kennir mína sjúkrasøgu.

Tí er ikki nøktandi at skula skifta lækna, greiða frá øllum umaftur og ikki fáa svar uppá tað, sum eg spyrji um. Serliga ikki tá tað er hart at stríðast við sjúkuna og fylgjurnar av henni, so at skula brúka óneyðuga tíð uppá at greiða frá umaftur og umaftur hvussu støðan er. Afturat hesum veit eg heldur ikki, hvønn lækna eg skal til næstuferð. Er tað aftur ein fremmandur?

Tað er av alstórum týdningi at hava ein lækna, sum eg føli meg trygga við og sum kennir mína sjúkrasøgu. Tað er mikið møguligt, at hesin læknin er dugnaligur, men kenslan eg hevði í viðtaluni var ikki serliga positiv.  Tí ynski eg veruliga at Pero Soré verður settur aftur í starv!

Vinarliga

Vanja K. Joensen